## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi, um kvøldið møguliga upp í hvassan vind. Fyrrapartin yvirhøvur turt, men seinnapartin regn. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum. Skýggjað og av og á regn. Hitin millum 8 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Framvegis óstøðugt veður. Hann veksur vindin nakað og hitin fellur.

# Buksurnar hálaðar longri upp

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Nú Smyril er komin aftur í sigling, hava suðuroyingar verið noyddur at vant seg við, at hann hevur fingið nýggjan lit.

Eftir at Strandfaraskipini hava verið svørt og hvít í mansaldrar, gjørdi Strandferðslan fyri nøkrum árum síðani av at skifta lit. Síðani hava øll skipini fingið ein meiri nýmótans myrkabláan lit ístaðin fyri tann svarta, og nú Smyril eisini er málaður, eru øll skipini í strandferðsluflotanum blá.

Samstundis er tann blái liturin togaður longri upp á skipið, so at tann hvíti liturin samstundis verður smalari. Ella sum onkur tók til í skemti: Tey hava hála buksurnar á Smyrli longri upp!!!

Tað liggur ongin serligur týdningur í tí bláa litinum, men snotilig eru skipini blivin og av tí, at tann blái liturin er hálaður longri upp, fær tað skipið at síggja styttri út.

*– Onkur helt fyri í skemti, at buksurnar á Smyrli vóru hálaðar longri upp. Sum tað sæst á myndunum, so røkkur blái liturin longri upp á síðurnar, enn tann svarti gjørdi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Smyril aftur í dokk í heyst

Men fyribils verður tað ikki so leingi, at Suðuroyingar kunnu fegnast um at hava Smyril í sigling, tí hann skal longu í dokk aftur í heyst.

Nú hann lá í dokkini á Skála, varnaðust tey, at tær báðar finnurnar - stabilisatorarnir- ikki virka, sum ætlanin er.

Finnurnar gera, at skipið ikki rullar so illa í aldusjógvi og hava tískil stóran týdning fyri møguleikarnar at flyta tungan flutning um veturin og fyri komfortin annars umborð.

Tí verður neyðugt at fáa Smyril aftur í dokk í heyst, áðrenn veturin byrjar, og tað fer væntandi at taka einar fýra vikur at umvæla finnurnar.

Tað tekur tríggjar mánaðir at fáa teir eykalutirnir, sum skulu setast í finnurnar. Tí hevur Strandferðslan avtalað við klassan, at Smyril sleppur at sigla í summar, men síðan skulu finnurnar umvælast. Samstundis er skipsmeklari biðin um at leita eftir einari hóskandi avloysaraferju fyri Smyril, men enn er ongin ferja funnin.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | 8 |
| Halifax | 10 |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 17 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 26 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 28 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 19 |
| New York | 30 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst yvir Skotlandi fer norðureftir og grynnist. Eitt lágtrýst í ein landsynning úr Grønlandi fer í ein landnyrðing og brúgvaløg haðani liggja yvir Føroyum leygardagin og sunnudagin.



Eitt lágtrýst tekur seg upp í ein útnyrðing úr Írlandi og fer mánanáttina norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/06 kl. 06⁰⁰– 13/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 12/06 kl. 06⁰⁰– 13/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 27,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. juni: Mánin longst frá jørðini
10. juni: Tendring
18. juni: Fyrra kvarter
19. juni: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juni | 10.11 | 22.37 | 09.11 | 21.37 | 09.26 | 21.52 | — | 12.11 | 00.46 | 13.11 | 08.26 | 20.52 | 07.26 | 19.52 | 10.26 | 22.52 | 11.26 | 23.52 | 09.56 | 22.22 | 11.11 | 23.37 |
| 15. juni | 11.02 | 23.28 | 10.02 | 22.28 | 10.17 | 22.43 | 00.37 | 13.02 | 01.37 | 14.02 | 09.17 | 21.43 | 08.17 | 20.43 | 11.17 | 23.43 | — | 12.17 | 10.47 | 23.13 | — | 12.02 |
| 16. juni | 11.53 | — | 10.53 | 23.18 | 11.08 | 23.33 | 01.28 | 13.53 | 02.28 | 14.53 | 10.08 | 22.33 | 09.08 | 21.33 | — | 12.08 | 00.43 | 13.08 | 11.38 | — | 00.28 | 12.53 |
| 17. juni | 00.18 | 12.41 | 11.41 | — | 11.56 | — | 02.18 | 14.41 | 03.18 | 15.41 | 10.56 | 23.20 | 09.56 | 22.20 | 00.33 | 12.56 | 01.33 | 13.56 | 00.03 | 12.26 | 01.18 | 13.41 |

5 707265 100050 >